Álit

í

løgtingsmáli nr. 6/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um ferðavinnu (Ferðavinnulógin) (Burðardygdargjald verður avroknað eina ferð um árið, TAKS fær heimild at krevja upplýsingar, roknskapartilfar o.tíl., ásetingar um rentu, innheintan, panting og afturhald í inntøku verða settar inn, broytt revsiáseting o.a.)

Landsstýriskvinnan í uttanríkis- og vinnumálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 28. august 2025, og eftir 1. viðgerð tann 11. september 2025 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 1. oktober 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Visit Faroe Islands, Ferðavinnufelagið, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS og landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og vinnumálumm, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Árni M. Dam) hevur hesar viðmerkingar:

Heitið á gjaldinum í lógini verður broytt. Í galdandi lóg er heitið “Gistingargjald”; hetta verður broytt til “Burðardygdargjald”. Hesum tekur meirilutin undir við.

Annars hevur lógaruppskotið, sum er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið og TAKS, til endamáls partvíst at útseta gildiskomuna frá 1. oktober 2025 til 1. januar 2026. Hetta verður gjørt fyri at geva vinnuni betri stundir til at fyrireika innheinting av gjaldinum. Hesum tekur meirilutin undir við.

Harnæst er endamálið at broyta innheintingina frá at vera mánaðarliga til at skula gjaldast árliga. Hetta er fyri at gera skipanina so einfalda og lætta at umsita hjá teimum sum eru fevnd av lógini sum gjørligt. Nú skal gjaldið avroknast samstundis, sum sjálvuppgávan/skattauppgerðin verður innlatin til TAKS. Sostatt skal gjaldið fyrstu ferð avroknast til TAKS 20. juni 2027 fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desembur 2026.

Upplýst er fyri nevndini, at TAKS arbeiðir við at gera eina einfalda talgilda skipan til skráseting av burðardygdargjaldinum.

Meirilutin tekur undir við, at skipanin verður gjørd lættari at umsita, bæði hjá TAKS, feløgum og einstaklingum.

Samstundis verða ásettar reglur um, at TAKS kann krevja upplýsingar, roknskapartilfar o.tíl. umframt reglur um innheintan, panting og afturhald í inntøku.

Hetta eru vanligar reglur, sum eru galdandi, tá TAKS stendur fyri innheinting av skatti og gjøldum. Slíkar reglur eru ikki ásettar í ferðavinnulógini, og verður hetta hervið broytt. Meirilutin tekur undir við broytingini.

Undir hoyringunum er nevndin gjørd varug við, at hægst loyvda gistingargjald á kr. 200 pr. persón, er sera trupult at umsita.

Lógin ásetur eitt gistingargjald á kr. 20 pr. person pr. dag, tó í mesta lagi kr. 200 ialt.
Um vit hugsa eitt dømi, har ferðafólk brúka ymiskar gistimøguleikar, t.d. hotel og Airbnb, og ferðin varir meira enn 10 dagar, so verður tað ómøguligt hjá teimum, sum skulu áleggja hetta gjaldið, at umsita nær og um gjaldið skal krevjast.

Av tí at tað er nærmast ógjørligt at umsita hesa ásetingina í lógini, og at hetta ikki kann broytast í hesum umfari, heitir meirilutin á landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og vinnumálum um at koma í Løgtingið við eini broyting, sum avtekur markið fyri mest loyvda gjald skjótast gjørligt.

Sambært galdandi ferðavinnulóg er gildiskoman fyri innkrevjing av burðardygdargjaldinum 1. oktober 2025. Sambært lógaruppskotinum ynskir landsstýriskvinnan at broyta gildiskomuna fyri innkrevjing av burðardygdargjaldinum (nú gistingargjaldinum) frá 1. oktober 2025 til 1. januar 2026 fyri at geva ferðavinnuni og myndugleikunum annars betri stundir at seta gjaldsskipanina í verk. Undir viðgerðini í nevndini vóru innkallaðu partarnir samdir um at leingja hesa freist til 1. februar 2026.

Samstundis varð uppskotið ikki liðugt viðgjørt í nevnd, áðrenn gildiskomufreistin fyri sjálvt lógaruppskotið 1. oktober 2025 var farin.

Neyðugt er tí at flyta gildiskomufreistina fyri bæði innkrevjing av burðardygdargjaldinum og gildiskomuna av lógaruppskotinum.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 8 verður “1. januar 2026” broytt til: “1. februar 2026”.

2. Í § 2, stk. 1 verður “1. oktober 2025” broytt til: “1. desember 2025”.

Viðmerkingar
Til nr. 1
Broyting av gildiskomu.

Til nr. 2
Broyting av gildiskomu.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Avgjaldsøðin hjá samgonguni og partvís saman við Sambandsflokkinum, hevur ávirkað allar krókar í føroysku familjunum.

Fyriliggjandi uppskot snýr seg um, hvussu krevjast skal inn, og um revsing í samband við eitt nýtt avgjald, sum skal koma í gildi 1. januar 2026. Eitt gjald, sum skal leggjast á allar sengur í Føroyum. Um hesar verða leigaðar út til ferðafólk, skal landið hava eitt gjald fyri hvørja nátt, sovið verður í eini song, sum privat eiga.

Sambært uppskotinum verður hetta gjaldið nú nevnt eitt burðadygdargjald. Tað er at kasta torvmold, tí talan er um eitt sovigjald til landskassan, hvørja ferð privat sýna blíðskap og loyva fremmandum eina legu til hvíld. Talan er als ikki um nakað burðadygdargjald, men um eitt sovigjald, sum verður álagt privatum í Føroyum at gjalda landskassanum fyri blíðskap.

Minnilutin setur eisini stórt spurnartekin við, hvussu eftirlitið skal verða við hesum sovigjaldi.

Hvussu skal TAKS kontrollera, hvør svevur hvar?

Allar inntøkur í Føroyum verða skattaðar. Fólk, sum forvinna pening av at leiga út, verða eins og øll onnur skattaði av inntøkuni. Um landsstýrið og Sambandsflokkurin vil skatta hesar inntøkur harðari enn aðrar inntøkur, so kundu tey hækkað skattin.

Ístaðin eru uppfunnir tveir nýggir umsitingartungir skattir á somu inntøkur. Talan er um ein eykaskatt, tað vit kalla eitt sovigjald. Harafturat er samtykt eitt tænastugjald, sum fólk, sum eiga hesi hús, skulu gjalda til kommunur, um hús verða leigað út til ferðafólk.

At áleggja somu inntøku 3 ymiskar skattir við trimum innkrevjingarskipanum er at uppbyggja fullkomiliga óneyðuga umsiting.

Minnilutin heldur, at inntøkur av útleigan eiga at skattast við sama skatti sum allar aðrar inntøkur.

Men, um samgongan og Sambandsflokkurin vilja skatta júst hesar inntøkur harðari enn aðrar inntøkur í landinum, so burdu tey heldur hækkað skattin, og rindað part av hesum til kommunurnar. At uppfinna 2 nýggjar skattir og 2 nýggjar innkrevjingarskipanir til som inntøkur er dára hugburður.

Løgmaður hevur sett eina nevnd at finna fram til, hvussu almennu Føroyar kunnu rekast bíligari. Tá tykist tað enn meira løgið, at sami løgmaður stendur fyri at uppfinna nýggj gjøld á somu inntøkur, sum krevur størri umsiting.

Ferðavinnan er vaksandi og er í ferð við at blíva enn eitt bein hjá føroyska búskapinum. At ovurskatta eina vinnu í uppbygging er alt annað enn mennandi fyri vinnuna.

Minnilutin tekur als ikki undir við sovigjaldinum og tekur tí heldur ikki undir við uppskotinum um innkrevjing, eftirlit og revsing.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum til ikki at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 20. november 2025

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Árni M. Dam	